


**Nr. 1** ***1. januar 2023*** **83. árg.**

# Jarða fortíðina

*„... vit skulu ganga í nýggjum levnaði.“ Róm. 6,4.*

Álvaratos: Tá ið vit nú ganga inn í nýggja árið, hava vit ikki ráð at lata fortíðina seta seg á okkara nútíð og oyðileggja okkara framtíð. Tað er tí, at ávís ting, sum ikki kunnu bøtast aftur, mugu goymast og gloymast! Tað eru tey, sum prísa Gudi hvønn sunnudag í kirkjuni, men heima liggja tey í andvekri og grava gomul bein upp, pilka í sárum og vekja upp aftur gomul minni. Vit mugu góðtaka, at summir trupulleikar ongantíð fara at verða loystir, og at teir standa til reiðar at flyta inn í okkara høvd, um vit loyva tí.

Er tað ikki nú, tá ið vit fara inn í nýggja árið, at tað er upp á tíðina at gevast at bera fortíðina á herðum okkara – ella í sinni okkara? Paulus sigur: „... men bjóðið heldur Gudi tykkum sjálv fram sum livnað upp frá deyðum.“ Róm. 6,13. Við øðrum orðum: Vit skulu vísa aftur at samráðast við gomul minni og at lata tey gera avtalur við okkum! Jarða tey, og ger tað í dag. Tað er ógjørligt at koma sær upp í eitt samband við onkran, sum er deyður og jarðaður! Nú er tíð uppá, at tú setir ein gravstein yvir hasi gomlu minnini – og ikki at tú fært tey aftur til lívs! Sumt her í lívinum er vert at minna seg aftur á, men ikki á syndirnar úr fortíðini, sum Jesus langt síðani hevur goldið fyri og jarðað.

„Símun Pætur svaraði honum: „Harri, hvønn skulu vit fara til? Tú hevur orð hins æviga lívs.“ Jóh. 6,68. Og hatta er tað. Vit hava ongan annan at fara til enn Jesus. Men hann er eisini hin besti. Hann eigur alt valdið í himli og á jørð. Hansara orð er

livandi. Fyll teg við Bíbliunnar orðum hvønn dag. So vilja vit at enda geva tær hesi ráðini frá M. Louise Haskins: „Og eg segði við mannin, sum stóð við portrið inn í nýggja árið: „Gev mær eitt ljós, so at eg kann stíga trygt inn í tað ókenda," og hann svaraði: „Far út í myrkrið og legg tína hond í Guds hond. Tað fer at verða betri fyri teg enn ljós og tryggari enn ein kendur vegur."

*Effie Campbell umsetti.*

# Himmalmerkið er ov kámt

Ein maður vitnaði niðri á Bláa Krossi: „Kona mín er av Sandoynni, so vit eiga nakrar seyðir í Dali. Har marka teir seyðin so, at á øðrum oyranum vísir merkið, at seyðurin hoyrir til Dals. Á hinum oyranum vísir merkið, hvønn hagapart seyðurin hoyrir til, eitt nú Miðhaga.

Á sama hátt er tað við okkum menniskjum, kunnu vit siga. Á øðrum oyranum stendur samkoman, ið vit hoyra til, og á hinum stendur Himmalin. Men mær tykir, at Himmalmerkið ofta er ov kámt, og at samkomumerkið er alt ov sjónskt. Bíblian sigur, at vit eru øll Guds børn við trúnni á Jesus. Tí eru vit brøður og systrar, og skulu vit syngja lovsongin fulltónandi uppi í himli, so mugu vit venja og syngja hann saman her."

*Effie Campbell.*

# Eitt skilagott svar

Ein vantrúgvandi maður spurdi einaferð eina sjúkrasystur á einum amerikanskum sjúkrahúsi: „Hevði Gud tín vilja givið mær 100 dollarar, um eg bað hann um teir?"

**Sjúkrasystirin svaraði:** „Um tygum fóru at vitja forsetan fyri fyrstu ferð, høvdu tygum so biðið hann givið tygum 100 dollarar?"

„Nei, eg hevði bíðað, til eg kendi hann eitt sindur betur," ljóðaði svarið.

Tá svaraði hon stillisliga: „Gud mín gav George Müller dollarar í millónatali; men George Müller kendi hann eisini væl. Tá ið tygum læra Gud betur at kenna, so fara tygum ikki at biðja hann geva tygum pengar, men tað, sum tygum treingja enn meira til."

„Og hvat er so tað?"

„Fyrigeving fyri syndir tygara og eina hjartabroyting. Eftir at tað er hent, er tíðin komin at biðja um okkurt annað."

Hetta skilagóða svarið náddi hjartað og samvitskuna hjá hesum unga manni. Sjúkrasystirin talaði satt við mildni og kærleika.

*Effie Campbell umsetti.*

# Jesus – hvør er hann?

Mangt undurfult hendi ta tíðina, Jesus livdi: blind fingu sjón, deyv hoyrdu, avlamin kundu brádliga renna og leypa avstað. Ja, enntá deyð vórðu vakt aftur til lívs, og menniskju, sum vóru bundin av óndum maktum, vórðu loyst og broytt. Tann, sum var miðdepilin í øllum hesum, var ein maður, hvørs navn hevði størri týdning enn nøvnini hjá øllum øðrum. Hin blindi biddarin við vegjaðaran, tollarin, sum stóð uppi í trænum og eygleiddi tað, sum fór fram, teir vísu grikkarnir, sum vóru á vitjan í Jerusalem ella kongur uppi á kongsborgini – allir høvdu teir saman spurning: Hvør er hann?

Profeturin hevði boðað frammanundan um hann, at mong menniskju skuldu undrast um hann, ja, kongar skuldu verða málleysir av undran um hann.

Hann fekk nógvar vinir og eftirfylgjarar, men eisini nógvar fíggindar. Mótstøðumenninir noyddust at viðurkenna framgongd hansara við orðunum: „Allur heimurin rennur jú aftan á honum.“ Men arbeiðstíð hansara gjørdist stutt og intensiv. Hann kemur aftur.

Hvat er tað meðni, sum er so serligt við deyða Jesu Krists, síðani boðanin um hetta hevur fingið menniskju at fara til verka og hevur upptikið tankar og sinni teirra alla hesa longu tíð?

Jesu deyði og uppreisn er loysningurin á menniskjunnar størsta tørvi. Tað er vegur Guds til okkara. Hansara kærleiksfulla og stórtøkna tilboð. Himmalin møtir jørðini. Gud steig niður í Kristusi og gjørdi eina semju millum heimin og seg.

Og henda semjan er frelsan – lív – sæla fyri hvønn tann, sum trýr á hann. Bíblian sigur: „Og ikki er frelsa í nøkrum øðrum; tí at ikki er heldur nakað annað navn undir himlinum givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við.“ – „Hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur.“

Bíblian sigur eisini, at tá ið vit nærkast Gudi – og tað gera vit, tá ið vit lesa Bíbliuna og biðja – tá nærkast hann okkum. Vit møta Gudi gjøgnum tað, Jesus hevur gjørt fyri okkum.

*„Det gode budskap“ – Effie Campbell umsetti.*

# Jesunavnið aldri bliknar

Á einum møti vesturi í Vágunum fyri nøkrum árum síðani spurdi ein gamal maður, um tey ikki kundu fara at syngja nr. 69 „Jesunavnið aldri bliknar, slítist ei av tíðar tonn.“ Síðani greiddi hann frá hesi hending:

„Eg sigldi undir krígnum. Vit fóru upp til Íslands at keypa fisk. Menn vóru bangnir og fjálturstungnir, tí minur róku allastaðni eftir sjónum. Ein dagin tók ein maður, sum stóð á dúrkinum í lugarinum og bendi seg inn í koyggjuna og tók sangbókina fram og fór at syngja „Jesunavnið aldri bliknar“. Hann sang hann einsamallur fyri øllum teimum, sum stóðu rundanum.

Tá ið sangurin var liðugur, bendi maðurin seg aftur inn í koyggjurúmið og legði bókina á hillina. Í somu løtu brast undir bógnum. Bara tríggir mans komu livandi frá hesi hending, hinir sjólótust við Tóri II, eisini maðurin, ið sungið hevði sálmin.

*Effie Campbell.*

---

Onkur hevur sagt, at um vit vóru gjørd úr glasi, og fólk kundu sæð, hvat ið vit hugsaðu, so høvdu vit øll viljað búð á einari oydnari oyggj.

*e.c.* ums.

---

Sunnudagsblaðið
ynskir øllum eitt
av Harranum signað nýggjár

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 8. jan. | **Tekstur:** 2 Mós. 19,1-25 | **Bíbliuorð:** 2 Mós. 19,5 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 2** ***15. januar 2023*** **83. árg.**

# Bjóða teimum at koma við!

*Anne Christiansen*

Um tú nakrantíð ert boðin í brúdleyp, føðingardag ella í ein flottan jóladøgurða, so veitst tú, at ein persónlig innbjóðing er nakað heilt annað enn ein almenn hópinnbjóðing.

Sunnudag eftir sunnudag fara vit til okkara gudstænastur, møtir og fundir. Men bjóða vit nøkrum at koma við, ella hugsa vit: „Um fólk vilja koma við, so skilja tey helst, at tað kunnu tey. Tey munnu fata, at vit fegin vilja hava tey við, og at vit vilja ynskja teimum vælkomnum."

Men fólk streyma jú ikki til av sær sjálvum, og hvussu kunnu vit vita, um hetta hevur teirra áhuga, tá ið vit ikki hava bjóðað nøkrum? Terry Parkman, leiðari fyri eitt stórt altjóða ungdómsleiðara netverk, segði mær søgu sína, hvussu hann kom til trúgv. 23 ferðir bjóðaði sami persónur honum á ungdómsmøti. Hann segði nei 22 ferðir, men ta 23. ferðina fór hann við! Hvussu mong okkara hava bjóðað sama persóni tvær ella tríggjar ferðir, og eru so givin? Terry bleiv bjóðaður aftur og aftur, fór so at enda við. Tey tóku væl ímóti honum í meinigheitini, og har upplivdi hann Jesus. Í dag er hann ungdómsprestur sjálvur, og tað besta, hann veit, er at síggja onnur uppliva Jesus, so sum hann sjálvur hevur gjørt tað.

At bjóða fólki kring okkum at taka lut í tí, vit seta hægst í lívi okkara, átti at verið heilt natúrligt, um vit elska menniskju og vilja, at tey skulu fáa lut í somu signing, vit sjálv hava fingið lut í? Aril Edvardsen kom til trúgv, av tí at ein maður, hvørs kona lá á somu føðideild á sjúkrahúsinum sum Kari, kona Aril, bjóðaði honum á møti við sær.

Hugsa tær, hvat ið hevði hent, um vit øll fóru undir at bjóða fólki allastaðni, har vit eru, at koma við okkum. Kanska verður ein einføld innbjóðing frá okkum innhurðin til egna møti teirra við hin livandi Gud.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hví er framrúturin størstur?

Á nýggjárinum hyggja vit bæði fram og aftureftir – kanska ov nógv aftureftir – serliga at tí, sum ikki gekk so væl. Tí vit hava øll okkurt, sum ikki gekk væl – kanska gekk tað rættiliga illa. Tá er gott at minnast til, hví bakspegilin í einum bili er nógv minni enn framrúturin. Tað er tí, at vit skulu hyggja frameftir – ikki aftureftir.

Uttan mun til, hvat ið miseydnaðist í farna ári, er tað týdningarmikið altíð at hava FYRIGEVINGINA við á lívsleiðini. Alt ov ofta hoyri eg: „Eg kann ikki fyrigeva honum tað, hann gjørdi!“ Ella: „Eg kann ikki fyrigeva mær sjálvari!“

Tá ið Gud kann fyrigeva ALT – og fyrigevur mær til mítt seinasta suff, so er tað mín ábyrgd at fyrigeva øðrum og mær sjálvari. Fyrigevingin er grundarlagið undir tí, at eg kann gloyma tað, sum liggur aftanfyri, sum Paulus málber seg í Fil. 3,13–14: „Brøður, eg haldi ikki meg sjálvan enn hava gripið tað; men eitt geri eg: eg gloymi tað, sum er aftan fyri bak, og eg rætti meg fram eftir tí, sum er fyri framman, og skundi soleiðis at málinum, til tann sigursgrip, sum Gud hevur kallað okkum til úr erva í Kristi Jesusi.“

Paulus stýrir beint móti málinum: Men eitt geri eg! Fæstu uppliva at gloyma misbrot og føll. Men um vit hava biðið um fyrigeving – og sjálv fyrigivið øðrum – gloyma vit tað á tann hátt, at vit ikki framhaldandi baksast við tað. Vit taka ikki ímóti ákærum hvørki frá satani, menniskjum ella okkum sjálvum. Tí Jesu blóð hevur reinsað talvuna reina!

Tí fáast vit ikki við tað, men venda eyguni móti framrútinum, rætta okkum eftir tí, sum er fyri framman, renna frameftir móti málinum og festa eyguni á Jesus, upphavsmann og fullkomnara trúarinnar!

„Hugsið um hann, sum hevur tolt slíkt mótmæli móti sær av syndarum, fyri at tit ikki skulu troyttast og verða givnir í sálum tykkara.“ Hebr. 12,3.

*Effie Campbell* umsetti.

# Náði Guds er nýggj á hvørjum morgni

*Harmaljóð 3,23.*

Tá ið tað stendur í Bíbliuni, at náði Guds er nýggj hvønn morgun, so er tað eitt framúrskarandi lyfti um hetta, at hvør dagur er ein nýggj byrjan. Eins og vit ikki skulu stúra fyri degnum í morgin, somuleiðis skulu vit ikki stúra fyri avleiðingunum av tí, sum vit gjørdu skeivt í gjár. Gud gevur tær eina nýggja byrjan hvønn dag, og Hann kann eisini fáa aftur í rættlag teir skeivleikarnar, sum tú gjørdi í gjár.

Er tað okkurt í fortíðini, sum tyngir teg, játta so tíni mistøk fyri Gudi, og Hann vil fyrigeva tær. Tað var tí, Jesus doyði á krossinum. Tað var tí, at tú kundi fáa fyrigeving fyri alt tað, tú hevur gjørt skeivt. Um tú takkar Gudi hvønn dag fyri tað, sum Jesus gjørdi fyri teg, so tekur tú ímóti Guds náði, og tú kanst vera sum føddur av nýggjum hvønn morgun. Er tað ikki bara undurfult, at Gud kennir okkara veikleikar og misbrot, og Hann hevur funnið eina loysn fyri okkum?

„Náði Guds er nýggj á hvørjum morgni." Harmaljóð 3,23.

*„Præsten og Psykologen"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Vit eru sett í frælsi frá deyðaangist

Fyri at fáa allan samanhangin er best at lesa Hebrearabrævið 2,10–18. Kvika tær ikki, les tað spakuliga – og fleiri ferðir. Tað kann tykjast eitt sindur knortlut, men tað rúmar eina heila røð av perlum – sum Guds orð vanliga ger. Ein teirra er, at Jesus við deyða og uppreisn síni hevur gjørt Djevulin máttleysan og sett okkum í frælsi frá ræðsluni fyri deyðanum – tann ræðslan hevur hildið okkum sum trælir.

Nýggja Testamenti á gerandismáli sigur tað soleiðis: „Jesus tók deyðans valdi frá Djevlinum og gjørdi tey fræls, sum alt lívið høvdu verið trælir av ræðslu fyri deyðanum."

Miðallivialdurin hjá monnum er 78 og hjá kvinnum 82. Tá ið vit hava hesi tøl í huga og fáa at vita, at 2.000 av teimum, sum í Danmark doyðu av koronu, vóru 80 ár og eldri, so síggja vit hesi tøl í røttum høpi.

Tað, sum er ein sorgarleikur, er at doyggja uttan trúnna á Kristus. Tá ið trúgvandi doyggja, er tað eingin sorgarleikur – men ein sigursfrøi yvir deyðan – av tí at Kristus vann á deyða-

num. Jóhs. 11,25: „Eg eri uppreisnin og lívið. Tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr.“ N.S.

Og tá ið andin og sálin siga farvæl við kroppin, og spurningurin úr 1. Kor. 15,55 ljóðar: „Deyði, hvar er sigur tín? Deyði, hvar er broddur tín?“ Tá ljóðar svarið: Hann er ikki til – tí lívið vann.

Tí kunnu vit siga við Grundtvig: „Krist stod op af døde – i Himlen vi ham møde!“ Men longu nú eru vit Jesus-trúgvandi loyst frá at óttast deyðan – loyst frá at trælka undir deyðaangist.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvør er tað, sum er fávitskutur?

Ein ungur brotsmaður lá sjúkur inni í fongslinum. Gamla gudsóttandi mamma hansara kom at vitja hann. Hon talaði so álvarsliga og við kraft til samvitsku hansara, so eisini hinir sjúku fangarnir vórðu sterkt ávirkaðir av tí. Eftir at hon var farin, vágaði eingin sær at tala orðið.

Endiliga var tað ein, sum breyt ta nívandi tøgnina og segði: „Íðan, hon er jú ikki annað enn ein gomul kona úr farnu øld og hoyrir til tey fávitskutu, sum enn trúgva Bíbliuni. Vit lata okkum ikki bergtaka av orðum hennara.“

Tá svaraði ein annar, sum var sterkt ávirkaður av tí, ið konan hevði sagt: „Tað kann vera, at hon er fávitskut, men hesi fávitskutu enda ið hvussu so er ikki í fongslinum soleiðis sum vit „upplýstu og klóku“.“

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tá ið tú eftir jól bert jólatræið út, missir tað nálirnar og er hálvnakið. Hví? Tí tað hevur mist sambandið við rótina. Soleiðis er tað eisini við okkum menniskjum. Tá ið vit hava kvett sambandið við okkara kristna arv, við Jesus okkara Frelsara og við Bíbliuna, so gongst ikki væl. Tað síggja vit, tá ið vit hyggja rundan um okkum.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 15. jan. | **Tekstur:** | 2 Mós. 20,1-11 | **Bíbliuorð:** | Mark. 12,30 |
| 22. jan. | **Tekstur:** | 2 Mós. 20,11-17 | **Bíbliuorð:** | Mark. 12,31 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74